# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 25.11.2025 |
| Mál nr.: | 25/08929 |
| Málsviðgjørt: | EK |
| Ummælisfreist: | 27.11.2025/05.01.2025 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt
(býti millum land og kommunu, tilboð og aldursbólkar, námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2005, løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006 og løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

“**(Dagstovnalógin)**”

**2.** § 2, stk. 2 verður strikað.

**3.** § 2 a. verður strikað.

**4.** § 3 verður orðað soleiðis:

“**§ 3.** Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og hevur ábyrgdina av virkseminum.
*Stk. 2.* Dagstovnar sambært hesi lóg eru hesi námsfrøðilig tilboð:
nr. 1. Dagrøkt og vøggustovur til børn í aldrinum 6 mánaðir til 35 mánaðir.
nr. 2. Barnagarðar til børn í aldrinum 36 mánaðir til byrjan av skúlagongd.
nr. 3. Frítíðarstovnar til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.
*Stk. 3.* Kommunan kann í serligum føri gera frávik í omanfyri standandi aldursbýti.
*Stk. 4.* Kommunan kann sambært hesi lóg skipa samansett tilboð til børn í aldrinum 6 mánaðir til og við 2. flokk.”

**5.** Aftaná § 3 verður sett:

“**§ 3 a.** Dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, hava opið gerandisdagar í dagtímunum. Frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum.
Kommunan ásetur nærri upplatingartíðir fyri dagstovnarnar.
*Stk. 2.* Kommunan kann uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 áseta, at

dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, heilt ella partvíst ikki hava opið ávísar dagar og í skúlafrítíðum, tó í mesta lagi 5 vikur tilsamans um árið, og í mesta lagi 4 samanhangandi vikur. Kommunan kann samskipa tilboð í frítíðum.

**§ 3 b.** Kommunurnar hava dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av dagstovnaøkinum.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri námsfrøðiliga virkseminum.

**§ 3 c**. Landsstýrisfólkið og kommunurnar skipa eina samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið við tí endamáli at fremja felags fakliga menning, samskipan og ráðgeving á lands- og kommunalum stigi.
*Stk. 2*. Nevndin verður mannað við javnbjóðis tali av umboðum frá landinum og kommununum.
*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um skipan, manning og virksemi nevndarinnar."

**6.** Sum yvirskrift yvir § 3 b. verður sett:

"*Námsfrøðilig ábyrgd, samstarv og samskipan*"

**7.** Aftaná § 5 verður sett:

"**§ 5 a.** Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum.
*Stk. 2.* Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv.
*Stk. 3.* Landstýrissfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, herundir reglur um upplýsingargongd og samstarv."

**8.** Sum yvirskrift yvir § 5 a verður sett:

"*Námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving*"

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Lógin um dagstovnar og dagrøkt er frá ár 2000. Síðani tá hevur samfelagið broytt seg nógv – bæði familjulív, arbeiðslív og faklig krøv til dagstovnar eru heilt onnur í dag. Foreldur hava aðrar tørvir og væntanir, og fakliga vitanin innan námsfrøði og menning er ment nógv.
Land og kommunur eru á einum máli um, at tørvur er á at endurskoða og dagføra dagstovnalógina, so hon hóskar til okkara tíð og veruleika.

Í verandi lóg eru fleiri viðurskifti ógreið. Tað er t.d. ikki nóg greitt, hvussu ábyrgdin verður býtt millum land og kommunur, og tað mangla felags fakligir karmar og greiðar reglur um ráðgeving. Ymiskir fakligir og skipanarligir leistir hjá kommununum hava gjørt, at skipanin í dag er ólík frá stað til stað. Hetta kann í ávísum førum elva til, at tænastur og atgongd til stuðul verða upplivað ymisk av børnum og foreldrum. Nakrar kommunur hava egnu námsfrøðiliga ráðgeving, meðan aðrar keypa tænastu uttanífrá, og hetta hevur ført til ymiskan struktur og tilgongd. Ein felags karmur kann tí styrkja gjøgnumskygni og tryggja meira javnbjóðis atgongd til fakligan stuðul og ráðgeving um landið.

Eitt dømi um ógreið viðurskifti í verandi skipan er, at lógin frá 2000 sigur, at dagstovnar fevna um vøggustovu, barnagarð, dagrøkt og frítíðarheim, samstundis sum viðmerkingarnar til lógina staðfesta, at frítíðarklubbar og frítíðarvirksemi ikki eru fevnd av lógini. Í 2006 varð tó kunngerð lýst, sum staðfesti, at frítíðarheim kunnu vera fyri børn frá 7 til 18 ár. Hetta hevur skapt ósamsvar og ógreið mørk millum tey námsfrøðiligu tilboðini, sum dagstovnalógin fevnir um, og tey sosial-námsfrøðiligu frítíðartilboðini til eldri børn og ung, sum hava annað endamál, starvsfólkasamanseting og fígging. Úrslitið er, at kommunurnar kunnu síggja hetta ymiskt, og harvið kunnu familjur fáa ymiska upplýsing og ymisk tilboð alt eftir bústaði.

Løgtingsins umboðsmaður hevur í eini ávísari klagumálsviðgerð lagt aðra tulking til grund fyri reglunum um upplatingar- og afturlatingartíðir enn tann, sum var nýtt í fyrisitingini. Hetta málið hevur víst á tørv á at dagføra og greiðari staðfesta reglurnar á økinum.
Arbeiðið við lógarbroytingini tekur støði í samgonguskjalinum hjá núverandi samgongu. Eitt av málunum er at dagføra dagstovnalógina og styrkja bæði námsfrøðiliga dygd og javnbjóðis tænastur á økinum.

Tí verður í arbeiðinum, við at dagføra dagstovnalógina serliga hugt at trimum høvuðsspurningum:

1. Hvussu skal ábyrgdin millum land og kommunur skipast?
2. Hvørji tilboð og aldursbólkar skal lógin fevna um?
3. Hvussu skal námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving skipast?

Við at taka hesar spurningar fram fyrst, verður tryggjað, at lógin byggir á eitt støðugt og fakligt grundarlag, sum kann mennast og laga seg til framtíðar tørv.

Endamálið við lógarbroytingini er at skapa eina greiða og nútíðarhóskandi skipan, har land og kommunur hava greiðar leiklutir, og har øll børn fáa somu góðu møguleikar, óheft av bústaði.

Kommunurnar skulu hava dagliga ábyrgd av rakstri, fígging og námsfrøðiliga innihaldinum, meðan landið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og setur felags faklig stevnumið og

karmar. Samstundis verður samstarv millum land og kommunur styrkt við eini felags nevnd, sum skal tryggja fakligan samanhang og menning á økinum.

Eitt serligt eyðkenni við føroyska dagstovnaøkinum er, at stovnarnir hava verið tilvitaðir um staðbundnar umstøður og mentanarlig viðurskifti. Hetta hevur verið ein styrki, tí dagstovnarnir hava megnað at tillaga seg til tørv og lívshátt í lokalum samfeløgum kring landið.
Samstundis er tørvur á, at vit sum land seta eina felags námsfrøðiliga stevnu, sum greiðir frá, hvat eitt dygdargott dagstovnatilboð eigur at umfata. Við trivnaðinum og menningini hjá barninum sum høvuðsmál, skal felags stevnumið tryggja, at øll børn í Føroyum fáa somu fakligu møguleikar.

Tørvur er eisini á greiðum reglum um, nær dagstovnar kunnu hava stongt, og hvussu foreldur fáa kunning um hetta, so rættindi og skyldur verða eins um alt landið.

Eisini verður lógarfest skipan fyri námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving, har kommunurnar sjálvar skulu veita námsfrøðiliga ráðgeving, einsamallar ella saman við øðrum kommunum, meðan landið
veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan. Hetta tryggjar greið faklig markamót og javnbjóðis tænastur fyri øll børn.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi dagstovnalóg (Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000) hevur til endamáls at tryggja børnum umsorgan, menning og kristna og siðalagsliga uppaling í einum tryggum og góðum umhvørvi.
Kommunurnar hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum og fyrisitingini, meðan landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina sambært § 2, stk. 2.

Lógin fevnir um dagrøkt, vøggustovur, barnagarðar og frítíðarheim, men fevnir ikki um frítíðarklubbar ella onnur frítíðar- og ungdómstilboð, sum annars eru vanlig í kommununum. Lógin ger heldur ikki greitt, hvussu aldursmørk og innihald í frítíðarheimunum skulu skiljast í mun til onnur tilboð til eldri børn og ung.

Ráðgeving og eftirmeting eru ikki skipað á eins hátt í landinum, og stórur munur er á, hvussu kommunurnar loysa hesar uppgávur.

Sambært § 3 í galdandi lóg hava kommunurnar ábyrgdina av at veita dagstovnapláss og reka virksemið. Dagstovnar og dagrøktir hava vanliga opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunurnar kunnu eisini bjóða víðkað opið – til dømis um kvøldi, um vikuskiftið ella sum samdøgursansing – sambært galdandi heimildum.

Kunngerð nr. 32 frá 4. mai 2006 staðfestir nærri reglur um býti og aldursbólkar á dagstovnum og dagrøktum:

- vøggustova: uml. 5–36 mánaðir,
- barnagarður: 3–7 ár,
- útibarnagarður: 4–7 ár,
- frítíðarheim: uml. 6–18 ár,
- samansjóðaður stovnur: uml. 5 mánaðir – 7 ár,
- dagrøkt: ansing í heimi dagrøktara ella í spælistovu, í mesta lagi fimm børn.

Í verandi lóggávu er ikki greitt, hvørt og í hvønn mun ungdómstilboð til børn og ung frá 3. flokki til 18 ár eru fevnd av dagstovnalógini.

Serligu viðmerkingarnar til lógina frá 2000 vísa á, at frítíðarklubbar og frítíðarvirksemi ikki eru fevnd av dagstovnalógini, tí tey hava eitt annað endamál og øðrvísi faklig krøv enn dagstovnar og dagrøkt.
Kortini ásetur kunngerð nr. 32 frá 4. mai 2006, at frítíðarheim kunnu fevna um børn og ung frá 7 til 18 ár.

Hetta skapar ógreið mørk millum:
- frítíðarheim undir dagstovnalógini og
- frítíðarklubbar/ungdómshús, sum ikki eru fevnd av lógini.

I praksis hava frítíðarheim í hesum breiða aldursbólki (7–18 ár) sera ymisk innihald, fakligar treytir og aldursbýti, og endamálið er ofta meira sosialt og mentanarligt enn tað námsfrøðiliga grundarlag, sum dagstovnaøkið byggir á.

Í 2018 varð áseting sett inn í dagstovnalógina at seta Dagstovnaráð. Dagstovnaráðið varð sett á stovn fyri at styrkja samstarvið millum land og kommunur og at veita felags fakliga ráðgeving á dagstovnaøkinum. Gongdin hevur tó víst, at tað hevur verið trupult hjá ráðnum at røkka hesum endamálinum við verandi samanseting og uppgávubygnaði, og tørvur er tí á at endurskoða, hvussu ein slík felags skipan kann virka best framyvir.

Sambært § 5 í dagstovnalógini hava børn við serligum tørvi rætt til dagstovnapláss og námsfrøðiligt tilboð á jøvnum føti við onnur. Kommunan hevur dagligu ábyrgdina, meðan landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina.

Fleiri kommunur hava sett námsfrøðiligar ráðgevar sambært § 5, men skipanin er ójavnt bygd upp, og eingin felags karmur er í lógini.
Lógin ásetur heldur ikki beinleiðis, at kommunurnar skulu hava námsfrøðiliga ráðgevingarskipan.

Sernám hevur síðan 2005 veitt sernámsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar, men hetta byggir á heimild í fólkaskúlalógini (§ 4, stk. 6) – ikki í dagstovnalógini – og hevur tí gjørt markamótini millum kommunur og land ógreið.

Tørvur er á at fáa greiðar heimildir og markamót fyri sernámsfrøðiliga ráðgeving í dagstovnalógina. Hetta samsvarar eisini við vanligu skipanina millum land og kommunur, har uppgávur, ið krevja serligan serkunnleika og miðsavnaðar fakligar loysnir, verða loystar á landsstigi, meðan tiltøk, ið kunnu gerast í lokal umhvørvinum, verða rikin av kommununum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógarbroytingini er at styrkja teir námsfrøðiligu og fakligu karmarnar um føroyska dagstovnaøkið og at tryggja, at øll børn í Føroyum hava javnbjóðis møguleikar fyri menning, trivnaði og sosialum felagsskapi. Lógin skal skapa eitt greiðari rættargrundarlag, har ábyrgdarbýtið millum land og kommunur er týðiligt, og har samstarvið millum dagstovnar og skúlar verður betur samskipað.

Sambært yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdini skal landsstýrisfólkið tryggja felags fakligt grundarlag og samskipan á dagstovnaøkinum. Henda uppgávan verður útint umvegis ein landsmyndugleika við fakligum førleika á økinum. Í dag verður arbeiðið rikið av Nám, sum hevur uppgávu at menna, samskipa og miðla felags námsfrøðilig stevnumið, leiðreglur og dygdaramboð til kommunur og stovnar, umframt at stuðla kommununum í menningar- og eftirmetingararbeiði.

Dagstovnur er í dag ein týðandi partur av lívinum hjá teimum flestu børnum í Føroyum. Foreldur eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, og dagstovnarnir hava ein lyklaleiklut at tryggja góðan og tryggan gerandisdag, menning, spæl og sosialar førleikar hjá barninum. Tí hevur dygdin í námsfrøðiliga arbeiðinum beinleiðis ávirkan á trivnað og javnrætt bæði hjá einstaka barninum og í samfelagnum sum heild.

Uppskotið tekur støði í trimum kjarnuspurningum, sum eru grundleggjandi fyri eina vælskipaða og framtíðarrættaða lóg:

1. hvussu ábyrgdarbýtið millum land og kommunur skal skipast,
2. hvørji tilboð og aldursbólkar lógin skal fevna um, og
3. hvussu námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving skal skipast.

Við at loysa hesi viðurskifti verður stovnað eitt felags og støðugt fakligt grundarlag, sum bæði tryggjar javnbjóðis tænastustig og gevur rúm fyri, at kommunur og stovnar framvegis kunnu tillaga tilboðið eftir staðbundnum umstøðum, sum er ein av styrkini í føroyska dagstovnaøkinum.

Eitt av endamálunum við uppskotinum er at greiða og avmarka, hvørji tilboð dagstovnalógin skal fevna um.

Uppskotið ger greitt, at dagstovnalógin fevnir einans um frítíðarstovnar fyri børn í forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk, har dentur verður lagdur á námsfrøðiligt innihald, tryggar fakligar karmar og trivnað hjá barninum eftir skúladag.

Tilboð til eldri børn og ung – frá 3. flokki og uppeftir – verða hinvegin skilmarkað sum frítíðarklubbar og ungdómshús, sum hava eitt annað endamál, eitt annað fakligt grundarlag og skulu skipast undir øðrum lógar- og fíggingarkarmum enn dagstovnar. Henda avmarking tryggjar greið rættarviðurskifti, javnbjóðis tilboð og fakliga røttu skipanina fyri hvønn aldursbólk.

Eitt annað endamál við uppskotinum er at staðfesta og styrkja ábyrgdarbýtið millum land og kommunur.
Kommunurnar fáa greiða ábyrgd av dagstovnaøkinum – námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga – meðan landið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri dagstovnaøkið.

Við uppskotinum verður eisini sett á stovn ein samstarvsnevnd, har land og kommunur regluliga samstarva um fakliga menning, dygd og samskipan. Hetta skal tryggja varandi samstarv og felags stevnu fyri økið.

Uppskotið ger eitt grundstig av námsfrøðiligari ráðgeving lógarbundið. Kommunurnar skulu hava námsfrøðiliga ráðgeving – einsamallar ella í samstarvi við aðrar kommunur – fyri at

styrkja stovnarnar í dagliga arbeiðinum, fakligum avbjóðingum og í arbeiðinum at lofta børnum tíðliga.
Sernámsfrøðilig ráðgeving verður veitt av landinum, tá tørvur er á serligum fakligum førleika, Hetta merkir, at kommunurnar fyrst arbeiða við námsfrøðiligu tiltøkunum og leita til landsins serkunnleika, tá avbjóðingarnar eru tvørfakliga samansettar og fara út um námsfrøðiligu karmarnar.
Sernámsfrøðiliga ráðgevingin hjá landinum verður veitt av fakfólki við serútbúgving innan m.a. sálarfrøði, talipedagogikki, ergo- og fysioterapi og sernámsfrøði. Hesi fakøkini eru somuleiðis ein natúrlig ábending um, hvar markamótini millum námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving liggja. Kommunurnar hava í høvuðsheitum námsfrøðingar sum hægstu útbúgving, meðan landsins fakligu eindir hava tann tvørfakliga serkunnleikan, sum krevst, tá tørvur er á útgreiningum, málsligum og motoriskum kanningum, sálarfrøðiligum metingum og serligum tvørfakligum tiltøkum.
Hetta ger greið faklig markamót og tryggjar, at bæði kommunur og land hava vælskipaðar leiklutir og skyldur.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at dagføra og greiða lógargrundarlagið fyri dagstovnar, so økið samsvarar við dagsins fakligu krøv, samfelagsligu broytingar og tørvin hjá børnum og familjum.
Uppskotið styrkir bæði námsfrøðiligu karmarnar og samstarvið millum land og kommunur, og tryggjar, at øll børn fáa javnbjóðis og dygdargott tilboð.

Við uppskotinum verður ábyrgdarbýtið staðfest og greitt. Kommunurnar fáa dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd. Landið fær yvirskipaða námsfrøðiliga ábyrgdina við heimild at seta felags faklig stevnumið og karmar. Eisini verður skipað ein samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið til tess at tryggja fakligt samskifti og menning.

Lógin verður somuleiðis dagførd, so tað verður greitt, hvørji tilboð og aldursbólkar hon fevnir um. Dagstovnar sambært lógini eru nú dagrøkt, vøggustova, barnagarður og frítíðarstovnur til børn í forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.
Tilboð til eldri børn og ung verða skilmarkað sum frítíðarklubbar og ungdómshús og eru ikki fevnd av dagstovnalógini, tí tey hava annað innihald og onnur faklig krøv.
Henda avmarking ger rættarstøðuna greiðari og tryggjar, at øll tilboð verða skipað eftir sínum serliga endamáli.

Uppskotið lógfestir eisini eina nýggja skipan fyri ráðgeving: Kommunurnar skulu veita fyribyrgjandi námsfrøðiliga ráðgeving – einsamallar ella í samstarvi við aðrar kommunur – og landið skal veita sernámsfrøðiliga ráðgeving. Hetta styrkir dygd, fyribyrging og fakligan samanhang á økinum.

Við dagføringini verður stovnað eitt nútíðarhóskandi og fakliga burðardygt grundarlag, sum tryggjar, at øll børn í Føroyum fáa somu góðu menningarmøguleikar, og at foreldur og stovnar fáa greið rættarviðurskifti og javnbjóðis tænastur, óheft av bústaði.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið skal til ummælis hjá hesum pørtum:

Kommunufelagið
Kommunala arbeiðsgevarafelagið.
Føroya Pedagogfelag,
Javnstøðunevndini,
Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum
MEGD
Fíggjarmálaráði,
Almanna- og mentamálaráðið,
Heilsumálaráðið

Aðrir partar at hugsa um:

Hjálparfólkafelagið
Áhugafelagið fyri dagstovnanámsfrøði
Felagsforeldraráð fyri Tórshavnar kommunu
Sernám
Nám
Almannaverkið
Barnaverndarstovan
Barnaverkætlanin

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

*Kommunur:*

Lógaruppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, tí kommunum verður álagt at hava námsfrøðiliga ráðgeving. Kommunurnar kunnu tó samstarva um felags námsfrøðiliga ráðgeving. Tørvurin á námsfrøðiligari ráðgeving kann tó vera ymiskur millum kommunur. Tí er trupult at meta heilt neyvt um kostnaðaravleiðingarnar á hesum stigi, og nærri metingar mugu gerast í samstarvi við kommunurnar, sum hava besta innlitið í veruliga raksturin.

*Landið:*
Sum lýst fyrr í viðmerkingunum (kap. 1.3), verður landsins námsfrøðiliga ábyrgd rikin av landsmyndugleika, í dag Nám. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 eru 300.000 kr. settar av til Nám at røkja yvirskipaða námsfrøðiliga ábyrgdina sambært nýggju § 3 b, stk. 2. Talan er um fyrireikingar og fakliga samskipan í sambandi við menning av felags námsfrøðiligum karmum, leiðreglum og ráðgevingarskipan.
Talið av uppgávum og arbeiðsbyrða fer væntandi at hækka í 2027, og verður mett, at ein øking á 700.000 kr. er neyðug í 2027 og frameftir verður mett at 1.000.000 skal til at fíggja eitt ársverk og tilhoyrandi rakstur í Nám.
Sernám røkir longu sernámsfrøðiliga ráðgeving fyri dagstovnaøkið sambært verandi praksis og hevur fakliga orku og skipanir til tess. Eingin eyka útreiðsla verður tí væntað hjá Sernámi.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar. Størsti parturin kann røkjast innan verandi skipanir við smávegis tillagingum. Høvuðsbroytingarnar fevna um staðfestan av leikluti hjá Nám sum fakligan landsstovn, greiðari stigskipan í ráðgevingini og møgulig samstarvi millum kommunur.
Somuleiðis kunnu ávísar umsitingarligar avleiðingar standast av, at kommunurnar og landsmyndugleikar skulu leggja virksemi teirra til rættis sambært broyttu reglunum.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Upskotið hevur avmarkaðar staðbundnar avleiðingar, vísandi til at
at smærri og útoyggjarkommunur kunnu fáa størri umsitingarligan tørv viðvíkjandi námsfrøðiligari ráðgeving, tí tær hava ikki egnan fakligan stovn.
Hetta verður tó javnað við samstarv millum kommunur ella keyp av tænastu frá størri kommunum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur positivar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, serliga fyri:

- børn við serligum tørvi, ið fáa tryggjaða fakliga ráðgeving eftir stigvísari og gjøgnumskygdari skipan (§ 5 a), og
- foreldur, ið fáa greiðari reglur um upplating, afturlating og kunning frá kommununi (§ 3, stk. 4–5).

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið stuðlar undir og er í tráð við altjóða sáttmálar, soleiðis:

***ST-sáttmálin um rættindi barnsins (Barnarættindasáttmálin, 1992),*** við tað at barnsins trivnaður er settur í fokus.

***Sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek***, við tað at skipanin fyri námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving (§ 5 a) tryggjar javnbjóðis atgongd til dygdargóðar tænastur.

**2.9. Markaforðingar og flytføri**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættin hjá borgaranum.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar nýggjar ásetingar um gjøld ella nýtslugjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið leggur ikki nýggjar skyldur á einstaklingar ella privat feløg.

**2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið hevur landsstýrisfólkinum heimild til at:

1. Áseta nærri reglur um skipan, manning og virksemi hjá samstarvsnevndini fyri dagstovnaøkið (§ 3 c, stk. 2), og
2. Áseta reglur um uppgávubýti, samstarv, upplýsingargongd, dátuvernd og svarfreistir millum kommunalu og sernámsfrøðiligu ráðgevingina (§ 5 a, stk. 3)

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum nýggja heimild til atgongd til privata ogn.

**2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?**
Uppskotið gevur ikki heimild til viðgerð av persónsupplýsingum.

**2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1 nr. 1.**
Heiti á lógini verður stytt og tillaga til tað navn sum verður brúkt í praksis í dag.

**Til § 1 nr. 2.**
Ásetingin um yvirskipaðu ábyrgd landsstýrismansins verður strikað úr endamálsorðingini og flutt til nýggja § 3 b.

**Til § 1 nr. 3.**
Ásetingin um dagstovnaráðið verður strikað.

Við ásetingini í 2018 varð heimild sett inn í dagstovnalógina at seta Dagstovnaráð við tí endamáli at styrkja samstarvið millum land og kommunur á dagstovnaøkinum. Í ráðnum hava sitið umboð m.a. fyri Kommunufelagið, Mentamálaráðið (nú Barna- og útbúgvingarmálaráðið), Námsvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Pedagogfelag og Javnstøðunevndina. Endamálið við ráðnum hevur verið at ráðgeva og menna fakliga arbeiðið á dagstovnaøkinum.

Hendan ráðgevandi skipanin sum hevur virkað umvegis dagstovnaráðið hevur verið eitt týdningarmikið stig móti betri samstarvi, men royndirnar vísa, at skipanin ikki í fullan mun hevur megnað at tryggja tað samskipaða samstarvið, sum ætlað var. Skipanin hevur heldur ikki havt lógarfestar heimildir at taka stig til felags menningarátøk ella at gera bindandi tilmæli.

Tí verður við hesi lóg heimildin um Dagstovnaráð strikað, og í staðin verður við nýggjari § 3 c lógarfest ein Samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið, sjá serligu viðmerkingar til § 1 nr. 5.

**Til § 1 nr. 4.**
**Serligar viðmerkingar til § 3 stk. 1-2.**

**Stk. 1**
Ásetingin er ein staðfesting av verandi praksis, men orðingin er dagførd fyri at gera ábyrgdarbýtið millum land og kommunu greiðari.
Ásetingin staðfestir, at kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og at kommunan hevur ábyrgdina av virkseminum á stovnunum. Við virksemi meinast við plássveiting, eftirlit og námsfrøðiligt virksemi á sjálvum stovninum.
Ásetingin stuðlar málinum um javnbjóðis námsfrøðilig tilboð kring landið og tryggjar, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunur verður meir sjónligt.
Kommunan hevur fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina, meðan landsstýrisfólkið røkir yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina sambært § 3 b, stk. 2.

**Stk. 2**
Ásetur, hvørji námsfrøðilig tilboð lógin fevnir um, og staðfestir, hvat aldursbýti áleið er og skipan av tilboðum.
Dagstovnaøkið fevnir um dagrøktir, vøggustovur, barnagarðar og frítíðarstovnar umframt samansett tilboð, sum koma undir hesa lóg. Samansett tilboð kunnu vera fleiri ymisk dagstovnatilboð, ið støðugt verða veitt undir somu lon og leiðslu.

Endamálið við ásetingini er at skapa greitt og javnbjóðis grundarlag fyri dagstovnaøkið og geva kommununum rásarúm at skipað tilboðini eftir lokalum viðurskiftum og námsfrøðiligum tørvi.

Aldursbýtið millum dagrøkt/vøggustovu og barnagarð er vegleiðandi og vísir til, hvat vanliga praksis í dag áleið er. Kommunurnar kunnu víkja frá teimum markum, sum eru nevnd í lógini, tá talan er um menningarlig atlit hjá barninum, praktiskar ella skipanarligar orsøkir. Í praksis kann verða ein talan um eina yvirgongd millum skipanirnar, so sum smábarnastovur ella tørvur er á, at eitt barn er longur í vøggustovu ella fer fyrr í barnagarð o.s.fr.

Dagrøkt er ansing í heimi hjá dagrøktara/spælistovu, í mesta lagi 5 børn.

Frítíðarstovnar eru ætlaðir børnum eftir skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum eftir avgerð hjá kommununi. Kommunan hevur skyldu at tryggja, at tilboðini eru námsfrøðiliga fullgóð og hóskandi í mun til aldur og menning hjá børnunum. Frítíðarstovnar skulu, sum minstamark fevna um børn upp til og við 2. flokk. Kommunan kann tó víðka tilboðið til eldri flokkar, t.d. 3. ella 4. flokk, um hon metir tað neyðugt.

**Til § 1 nr. 5.**
**Serligar viðmerkingar til § 3 a, stk. 1-2**

**Stk. 1**
Ásetur reglur um upplatingartíðir fyri dagstovnaøkið.
Dagrøktir, vøggustovur og barnagarðar hava opið gerandisdagar í dagtímunum, meðan frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum. Gerandisdagur í hesum høpi er frá og við mánadag til og við fríggjadag. Kommunan kann áseta nærri upplatingartíðir fyri hvønn einstakan dagstovn sambært § 3 stk 2, soleiðis at til ber at tillaga stovnsvirksemi eftir eitt nú tørvi og lokalum umstøðum.
Ásetingin heimilar eisini kommununi at áseta nærri reglur um, hvussu frítíðarstovnar hava opið í skúlafrítíðum.

**Stk. 2**
Ásetingin gevur kommuni heimild at avmarka upplatingartíðir heilt ella partvíst. Dagstovnar, undantikið frítíðastovnar, kunnu í mesta lagi hava stongt fimm vikur tilsamans um árið, íroknað tær fýra samanhangandi vikurnar frí. Umráðandi er tó, at kunning um slíkar avmarkingar latast foreldrum í góðari tíð, og gjarna minst seks vikur frammanundan tá talan er um einkultar frídagar so sum ráðleggingardagar, meðan kunning um samanhangandi frítíð, so sum jólafrítíð o.a. eigur at vera kunnað um, tá dagstovnur letur upp eftir summarfrítíð.

Endamálið við ásetingini er at gera eitt felags minsta mark fyri, hvussu nógvar vikur dagstovnar kunnu hava stongt, soleiðis at foreldur hava rímiligan tryggleika og frammanundan kunnu fáa greiða kunning. Kommunurnar hava í verki fakliga og fyrisitingarliga metingarrættin, og verða ikki væntaðar at leggja afturlatingardagar tilvildarliga.
Ásetingin skal tryggja skipaða frítíð og geva stovnum møguleika at leggja arbeiðsætlanir og nýta arbeiðsorku rímiliga, samstundis sum familjur og starvsfólk kunnu fyrireika sína frítíð. Kommunan eigur at ráðføra seg við foreldraráðið, áðrenn avgerð verður tikin um slíka afturlating, soleiðis at tað verður tryggja, at foreldur verða hoyrd.

Í fleiri kommunum verður skipað fyri samanløgdum tilboðum tvørtur um stovnar, meðan stovnar hava summarstongt. Hetta er eisini ein møguleiki sambært hesi grein og gevur

kommunum rásarúm til at tryggja tilboð í tíðarskeiðum, har stovnar eru stongdir. Tað er tó umráðandi, at slíkar skipanir altíð verða lagdar til rættis við atliti at barnsins besta, soleiðis at børnini fáa tryggar og kendir karmar.

Talan kann eisini vera um tilboð, sum tíðaravmarkað ella vegna serligar umstøður, verður veitt saman, t.d. tilboð, sum verða løgd saman undir somu lon í sambandi við frítíð, ella tilboð, sum vegna størri skaðar, umbygging ella nýbygging, má veitast aðrastaðni.

**Serligar viðmerkingar til § 3 b, stk. 1-2.**

**Stk. 1.**
Ásetingin ger greitt, at kommunurnar hava dagliga ábyrgd fyri øllum dagstovnaøkinum – fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga. Hetta merkir, at kommunurnar eru nærmasti myndugleiki fyri rakstri og innihald, og hava ábyrgd fyri, at virksemið verður rikið og ment í samsvari við lógina og faklig krøv.

Daglig *námsfrøðilig ábyrgd* merkir, at kommunan hevur fakliga ábyrgd fyri innihaldi og menning av námsfrøðiliga arbeiðinum á stovnunum.
Hetta merkir, at kommunan leggur fakligt grundarlag fyri arbeiðinum, tryggjar fakligar karmar og eftirmeting, og hevur neyðugar skipanir, ið stuðla undir menning og dygd í samsvari við málini í lógini.
Kommunan skal hava førleika og skipan til at kunna fylgja við, men endaligu fakligu karmarnir verða ásettir á landsstigi, sjá stk. 2.

Daglig *fyrisitingarlig ábyrgd* merkir, at kommunan stýrir og samskipar virksemið á stovnunum og tryggjar, at tað verður skipað og rikið sambært galdandi reglum.
Hetta fevnir m.a. um leiðslu og arbeiðsviðurskifti, skipan av starvsfólkum, góðkenning og regluliga eftirmeting.

Daglig *fíggjarlig ábyrgd* merkir, at kommunan hevur ábyrgd fyri útreiðslum, rakstri og fígging av dagstovnaøkinum.
Hetta merkir, at kommunan leggur fíggjarligar karmar fyri økið, tryggjar, at teir samsvara við lógarfestar skyldur, og hevur eftirlit við, at raksturin er fíggjarliga burðardyggur.

Sambært § 10 í lógini hava kommunurnar harumframt eftirlit við, at stovnarnir virka sambært hesum skyldum.
Tað undirstrikar samanhangin millum ábyrgd og eftirlit, har kommunan ikki bert rekur, men eisini tryggjar fakliga og fyrisitingarliga reglusemi innan teir karmar, sum lógin setur

Kommunurnar kunnu skipa samstarv sínámillum fyri at loysa uppgávur á burðardyggan hátt, t.d. innan ráðgeving, dygdar- og menningararbeiði. Slíkt samstarv skal tryggja javnbjóðis tænastur í øllum kommunum.
Við ásetingini verður ábyrgdarbýtið greitt: Kommunurnar hava rakstrarligu og fakligu ábyrgdina, meðan landsstýrisfólkið røkir ta yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina sambært stk. 2.

**Stk. 2**
Ásetingin viðførir, at landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina fyri dagstovnaøkinum.

Hetta merkir, at landsstýrisfólkið skal tryggja felags fakligt grundarlag, samskipan og vegleiðing fyri menning á økinum, uttan at taka frá kommununum teirra dagligu fakligu og fyrisitingarligu ábyrgd.
Endamálið við ásetingini er at skapa ein felags og javnbjóðis karm um námsfrøðiliga virksemi og menning í øllum landinum, har kommunurnar arbeiða innan fyri felags fakligar karmar, men hava frælsi til lokalar tillagingar.

Yvirskipað námsfrøðilig ábyrgd fevnir um felags faklig stevnumið og vegleiðing á landsstigi.
Landsstýrisfólkið kann røkja hesa ábyrgd gjøgnum undirliggjandi fakligan stovn, í dag Nám, sum miðlar vitan og samskipar arbeiðið á økinum. Stovnurin hevur leiðandi og samstarvandi leiklut í at savna vitan, miðla gransking og menna fakligt tilfar, sum kommunurnar kunnu brúka í síni menning og eftirmeting.
Endamálið er at skapa felags fakligt støði og samskipaða menning, ikki at leggja nýggjar skyldur á kommunurnar.

Ábyrgdin hjá landsstýrisfólkinum fevnir í høvuðsheitum um hesar fakligu uppgávur:

***Yvirskipað námsfrøðilig vegleiðing***
- at geva kommunum felags fakligar karmar, leiðreglur og metingaramboð til fakligt arbeiði,
- at miðla nýggjasta fakliga vitan og gransking á dagstovnaøkinum.

***Felags standardar fyri góðsku***
- at orða leiðreglur og fyrimyndir fyri góða námsfrøðiliga dygd á dagstovnum, m.a. innan spæl og læring, samskifti, málmenning, trivnað og sosialar førleikar,
- at tryggja, at hesir fakligu karmar verða brúktir sum felags grundarlag, men við rúmi til lokalar tillagingar.

***Framleiðsla av fakligum tilfari og amboðum***
- at menna og miðla tilfar og vegleiðingar, grundað á gransking og royndir úr praksis,
- at stuðla undir kommunalt arbeiði og forða fyri tvíarbeiði.

***Samanhangur millum dagstovnar og skúlar***
- at menna leiðreglur og fakligt tilfar, sum tryggja greiða yvirgongd frá dagstovni til skúla,
- at fremja fakligan kontinuitet millum stovnar og skúlar.

Sum áður víst á, so hevur landsstýrisfólkið sambært § 10 yvirskipað eftirlit við, at kommunurnar røkja síni lógarbundnu skyldur á dagstovnaøkinum. Ásetingin í § 3 b. stk. 1 tryggjar, at yvirskipað ábyrgd og eftirlit fylgjast, t.e. at landsstýrisfólkið skal tryggja, at fakligu karmarnir eru greiðir, og at kommunurnar fáa neyðugan fakligan stuðul og vegleiðing til at røkja sítt virksemi sambært lógini.

**Serligar viðmerkingar til § 3 c, stk. 1-3.**

**Stk. 1**
Við hesi áseting verður stovnað ein formaliseraður samstarvspallur millum land og kommunur á dagstovnaøkinum. Endamálið er at tryggja felags fakliga kós, dygd og samskipan av arbeiðnum á økinum og at styrkja samanhang millum yvirskipað námsfrøðiliga ábyrgd landsins

og dagliga fakliga og fyrisitingarliga ábyrgd hjá kommunum. Samstarvsnevndin skal virka sum fakligt og strategiskt ráðgevandi organ, har báðir partar hava javnbjóðis møguleikar at ávirka felags arbeiðið.

**Stk. 2**
Ásetingin staðfestir, at samstarvsnevndin verður skipað við javnbjóðis tali av umboðum frá landinum og kommununum.
Ásetingin skal tryggja neyðugan stuðul til skipanina frá báðum pørtunum, soleiðis at nevndin kemur at virka sum eitt felags fakligt forum. Nevndin er sostatt ein pallur har faklig menning og samskipan verður umrøtt og framd í felag.

Landsstýrisfólkið tilnevnir umboð fyri landið, meðan Kommunufelagið tilnevnir umboð fyri kommunurnar.

**Stk. 3**
Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur um manning, skipan, arbeiðsgongd og virksemi hjá samstarvsnevndini.
Kunngerðin skal verður gjørd í tøttum samstarvi við Kommunufelagið, fyri at tryggja, at báðir partar eru tiknir við í orðing av reglunum, og at arbeiðsskipanin er fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga rímilig.
Heimildin kann m.a. nýtast til at áseta reglur um:
- fundarskipan, arbeiðsætlan og arbeiðsbýti í nevndini,
- fakligar uppgávur, ábyrgdarbýti og arbeiðsøki hjá nevndini,
- mannagongdir fyri samskipan millum land og kommunur,
- upplýsingargongd og skjalagoymslu,
- samskipan á økjum, har dagstovnar og skúlar hava felags áhugamál, tó uttan at leggja skyldur á skúlaskipanina.

Heimildin fevnir tó ikki um at leggja nýggjar fíggjarligar ella umsitingarligar skyldur á kommunurnar uttan semju og fíggjarliga viðgerð.

**Til § 1 nr. 6.**
Yvirskrift verður sett yvir § 3 b.

**Til § 1 nr. 7.**

**Serligar viðmerkingar til § 5 a, stk. 1-3.**

**Stk. 1**
Ásetingin staðfestir skyldu hjá kommununum at veita námsfrøðiliga ráðgeving.
Námsfrøðilig Ráðgeving er ein námsfrøðilig tænasta, sum hevur til endamáls at tryggja fakligar, inkluderandi og fyribyrgjandi tilgongdir á dagstovnaøkinum.
Ráðgevingin miðar í fyrstu syftu eftir at lofta støðum hjá børnum, ið hava avbjóðingar í menning, sosialum felagsskapi, samskifti, trivnaði ella atferð, áðrenn tørvur er á sernámsfrøðiligum ella tvørfakligum tiltøkum.

Kommunal námsfrøðilig ráðgeving fevnir m.a. um:
– námsfrøðiliga vegleiðing til starvsfólk og leiðslur,
– eygleiðingar, reflekterandi arbeiðshættir og konsultativa tilgongd,
– meistaralæru, har ráðgevar arbeiða í felag við starvsfólkum,
– námsfrøðilig fyribyrging og einkult tiltak til børn við avbjóðingum,

– menningarverkætlanir og skeiðsvirksemi, sum styrkja námsfrøðiliga dygdina,
– grundleggjandi einfald sernámsfrøðilig amboð
Endamálið er at tryggja trivnað, menning og inklusjón í almennu dagstovnatilboðunum.

**Stk. 2**
Ásetingin staðfestir at sernámsfrøðilig ráðgeving verður veitt av fakfólkum við serútbúgving innan sálarfrøði, talilærarum, ergo- og fysioterapi, sernámsfrøði o.ø.
Tænastan byggir á tvørfakliga vitan og er ætlað børnum, har tørvur er á serligari viðgerð, útgreining, motoriskum ella málsligum stuðli, sosialum átøkum ella øðrum tiltøkum, sum liggja uttan fyri fakliga rammuna hjá námsfrøðiliga ráðgeving.

Sernámsfrøðilig ráðgeving fevnir m.a. um:
– sálarfrøðiliga kanning ella viðgerð
– taliráðgeving ella tekn-til-talu-arbeiði
– ergo- ella fysioterapi
– motoriskar ella málsligar kanningar
– greiningar ella ávísingar til psykiatri ella serlig tilboð
– tvørfaklig servitan innan hoyrn, sjón o.a.

**Stk. 3**
Í summum málum kann vera ein ávís umskaring millum námsfrøðiligu ráðgevingina og sernámsfrøðiligu ráðgevingina. Tað er tí umráðandi við greiðum markamótum, soleiðis at tað greitt framgongur, at sernámsfrøðiliga ráðgevingin, frá landinum veitir neyðug átøk , sum krevja serliga tvørfakliga vitan, meðan námsfrøðilig ráðgeving hevur ábyrgd av námsfrøðiligum og inkluderandi tiltøkum.
Kunngerðin sambært stk. 3 kann nýtast til at áseta felags mannagongdir fyri málsgongd, samskipan, ábyrgdarbýti og upplýsingargongd millum kommunur og land, harundir møguligar ásetingar um, hvussu foreldur og onnur í foreldranna stað, verða tikin við í ta einstaka málið.

Einhvør flytan av persónligum upplýsingum, skal til eina og hvørja tíð verða í tráð við galdandi reglar á økinum.

**Til § 1 nr. 8.**
Yvirskrift verður sett yvir § 5 a.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 25.11.2025.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: